# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur roynt at bankað 0-hugsjónina inn í høvdini á okkum seinastu árini. Hetta hevur givið úrslit – m. a. tað úrslit, at Føroya Løgting hevur tikið hana við í lóggávuna, at vit ikki góðtaka, at fólk doyggja ella verða álvarsliga skadd í ferðsluni.*

*oddagreinin*

## Gott Ferðstutrygd!

Í gjár mintust vit tey deyðu í ferðsluni. Síðani 2. september í 1928, tá tann fyrsti doyði í ferðsluvanlukku í Gøtudali, eru umleið 250 fólk farin. Hetta er ov nógv - hetta er í veruleikanum 250 fólk ov mikið. Vit skulu ikki góðtaka, at nakar doyr ella fær álvarsligan skaða í ferðsluni.

Og hetta er júst málið, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur roynt at bankað inn í høvdini á okkum seinastu árini. Hetta hevur givið úrslit – m. a. tað úrslit, at Føroya Løgting hevur tikið 0-hugsjónina við í lóggávuna, at vit ikki góðtaka, at fólk doyggja ella verða álvarsliga skadd í ferðsluni.

Í gjár vóru blómur lagdar á støð, har fólk eru farin í ferðsluni. Hetta er ein sera vakur siður, og stórt rós eigur Ingi Gunnarsson fyri, sum einsamallur maður at hava tikið stig til hetta. Hetta er vorðið eitt afturvendandi tiltak, sum Ferðslutrygd hevur stuðlað dyggiliga. Føroya fólk taka eisini væl undir við tiltakinum, sum – bara tí at vit leggja okkum hetta meira í geyma – er við til at minka um skaðarnar og vanlagnurnar av ferðsluni.

Í síðstu viku var Ferðslutrygd frammi við tí sjónarmiðnum, at vit eiga at seta upp bilverjur í øllum tunlum. Eitt uppskot, sum stjórin á Landsverki ikki tók undir við út frá tí, at hann helt, at pengarnir vórðu betur brúktir til onnur ferðslutrygdarfremjandi endamál. Kanska hevur hann rætt. Men so víst hevur Ferðslutrygd eisini rætt í tí, at bilverjur áttu at verið í øllum tunlum, tí tá minkaði vandin fyri, at fólk komu álvarsliga til skaða – ella doyðu, um tey komu illa fyri í ferðsluvanlukku. Men bara tað at hetta sjónarmið kemur upp, er gott í sær sjálvum. Vit eru fleiri, sum taka hetta til okkum, og harvið hevur Ferðslutrygd økt okkara tilvitan um ferðslutrygdarvandan í tunlunum. Tað kann væl vera, at hetta eru illa útgivnir pengar í mun til okkurt annað. Men bara tað at vit verða gjørd tilvitað um hetta kann bjarga mannalagnum í sjálvum sær, so Ferðslutrygd: Komið við fleiri slíkum hugskotum, sum fólk, politikarar og avgerðartakarar annars kunnu hava eina meingin um!

Men so leingi hetta er við til at økja tilvitanina um vandan, so er tað altíð gott. Og tað er júst tað, sum eitt ráð sum Ferðslutrygd er til. Gott í tykkum, komið við fleiri slíkum gullkornum!

**Sosialurin**

## Vit hava ikki ráð at lata vera

**RÚNA SIVERTSEN**
formaður Ráðið fyri Ferðslutrygd

**Spurningurin er ikki, um vit hava ráð, men um vit hava ráð at lata vera**



Í dag er minningardagur teirra deyðu í ferðsluni. Dagurin, tá vøkur blómutyssi prýða vegjaðararnar kring landið.

Men minnini, sum blómurnar vekja, eru ikki vøkur.

Blómurnar minna okkum á øll tey, ið gjøgnum árini hava látið lív í ferðsluni.

Hjá nógvum er hesin dagurin ringasti dagur í árinum, tí hann skræðir upp tey sár, sum ongantíð vilja lekjast.

Ferðsluvanlukkur raka ikki bara tann einstaka. Eisini tey avvarðandi fáa varandi sár. At missa ein av okkara kæru ella ein góðan vin, brádliga og harðliga, er tað ringasta, ið vit kunnu uppliva.

Eisini tey avvarðandi at einum, sum fær álvarsaman ella varandi skaða, verða hart rakt.

Tað er neyðugt at gera alt, sum gerast kann fyri at fyribyrgja ferðsluvanlukkum.

Nærum hvørja ferð tosað verður um, hvørji tiltøk skulu gerast fyri at bøta um ferðslutrygdina, verður sagt, at spurningurin er, hvat vit hava ráð til.

Men spurningurin er ikki, hvat vit hava ráð til, men um vit hava ráð at lata vera.

Ein minningardagur, sum hesin, kann verða við til at venda sjóneykuni frá turrisligum hagtølum, til at varpa ljós á bæði lagnur og tann einstaka aftanfyri tølini.

Vónin er, at hesin dagurin kann gera okkum meira tilvitandi og elva til eina atferð, sum ger, at vit kunnu verða tryggari í ferðsluni.

Fylg ferðslureglunum!

Øll kunnu vit gera okkara til at minka um vandarnar fyri ferðsluvanlukkum.

Tað ikki altíð tey stóru tøkini, ið skulu til, fyri at gera munin millum deyða og lív.

Bind teg í trygdarbelti, nýt endurskin, hjálm og ryggverju, Tað eru nakrar av teimum reglum og ráðum, sum kunnu bjarga tær lívinum í einari ferðsluvanlukku.

Við hesum fáu orðum vil eg sýna djúpastu virðing fyri teimum, ið hava látið lív í ferðsluni og samkenslu við teimum, sum hava mist ein kæran.

## Nýggjur fólkaskúli í Hoyvíkshaganum

**Tórshavnar kommuna er nú farin í gongd við at byggja nýggja tveysporaða fólkaskúlan í Hoyvíkshaganum. Ætlandi verður skúlin liðugur á sumri 2008.**

**SKÚLABYGGING**

Nýggi fólkaskúlin í Hoyvíkshaganum skal rúma næmingum frá 1. til 9. flokk í tveimum sporum, og harumframt skal frítíðarskúli eisini vera til næmingar í 1. og 2. flokki. Í heildarætlanini er pláss lagt av til svimjihyl, sum møguliga kemur seinni. Arbeiðið at byggibúna økið var boðið út í innbodnari lisitatión millum fimm fyritøkur, harav tær fýra valdu at geva tilboð, ið lógu millum góðar sjey og góða hálvaníggjundu millión krónur. Kommunan hevur tikið av lægsta tilboðnum, sum var frá Samtakinum TH & ZRJ við Tórhalli Hansen og Zachariasi R. Jacobsen. Tilboð frá teimum er upp á 7.067.578 krónur, sum er góðar 800.000 krónur lægri enn kostnaðarmetingini. Umframt byggibúningina, so ætlar Tórshavnar kommuna at bjóða arbeiðið við nýggja fólkaskúlanum í Hoyvíkshaganum út í tveimum umførum aftrat, sum fevna um ávikavist rábygning fyri seg og liðugtgerð fyri seg. Hildið verður, at á henda hátt ber til at fáa skúlan lidnan til tíðina, so eitt nú prosejkteringin kann halda fram, sjálvt um spakin er settur í.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.